

**TOYOTA COROLLA VERSO 7PERS MMT** 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: TN 436 KM: 36.500
Árgangur: 22.07.04 Seinast sýnaður: 22.07.04
Viðmerking: AC - Fjarstýrt sentral lás - el rútar - el spegl - fløguspælara
Útgjald: kr. 59.500,- Kr. 238.000,-



**TOYOTA COROLLA 1,9 D LINEA TERRA SED** 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: AG 787 KM: 116.000
Árgangur: 09.06.00 Seinast sýnaður: 04.03.04
Viðmerking: Elrútar/spegl - Sentrallás - Radio/CD
Útgjald kr. 36.750,- Kr. 105.000,-



**TOYOTA AVENSIS 2,0 D4-D TERRA** 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: GB 644 KM: 96.000
Árgangur: 20.11.01 Seinast sýnaður: 11.02.05
Viðmerking: Elrútar/spegl - Fjarstýrt sentrallás - Radio/CD - klimaanlegg
Útgjald kr. 37.000,- Kr. 148.000,-



**TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA H/B**

Skrásetingarnr.: RV 511 KM: 115.000
Árgangur: 27.04.99 Seinast sýnaður: 04.03.04
Kr. 70.000,-



**TOYOTA COROLLA 1,9 DIESEL TERRA STW** 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: PJ 659 KM: 150.000
Árgangur: 11.04.01 Seinast sýnaður: 11.04.01
Viðmerking: Elrútar/spegl - Sentrallás - Radio/CD
Útgjald kr. 24.500,- Kr. 98.000,-



**OPEL ASTRA 2,0 DIESEL, AUT.GEAR** 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: DN 206 KM: 40.000
Árgangur: 29.03.00 Seinast sýnaður: 14.04.04
Viðmerking: Elrútar/spegl - Fjarstýrt sentrallás - Radio/Fløguspælari
Útjald kr. 37.800,- Kr. 108.000,-



**TOYOTA AVENSIS 1,8 LINEA SOL SED** 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: UV 201 KM: 52.000
Árgangur: 31.10.01 Seinast sýnaður: 31.10.01
Viðmerking: Elrútar/spegl - Fjarstýrt sentrallás - Radio/CD - klimaanlegg - hiti í setrum framman
Útgjald kr. 39.750,- Kr. 159.000,-



**SKODA OCTAVIA 1,6**

Skrásetingarnr.: MG 284 KM: 65.000
Árgangur: 27.11.98 Seinast sýnaður: 07.01.05
Útjald kr. 23.450,- Kr. 67.000,-



**TOYOTA CAMRY 2,2 GL SEDAN** 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: FS 987 KM: 95.500
Árgangur: 02.04.98 Seinast sýnaður: 08.06.04
Viðmerking: Elrútar/spegl - Klimaanlegg - Fartpilot - Sentrallás - Radio/CD
Útgjald kr. 40.250,- Kr. 115.000,-



**SUBARU LEGACY GL 2,0**

Skrásetingarnr.: HU 698 KM: 115.000
Árgangur: 25.09.96 Seinast sýnaður: 25.08.04
Viðmerking: Sentrallás - Elrútar aftan og framman - Radio/CD
Kr. 54.000,-

**Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.


# Føroyskur móti skal longur út í heim

**"Vit hava valt hetta plaggið, tí vit meta tað vera tað mest nýskapandi". Soleiðis ljóðaði grundgevingin hjá dómsnevndini í snið- & handverkskappingini 2005. Vinnandi plaggið hjá Ingu Mariu Vang var ein tíðarleysur og aldursleysur kjóli**

SNIÐ&HANDVERK
*Snorri Brend*

Seinnapartin sunnudagin varð vinnarin av hesi kappingini almannakunngjørdur. Við spenningi hevur verið sæð fram til hesa løtuna, og tá so kunngjørt varð, hvør vunnið hevði, skiltist á fólki, at valið helst var rættvíst.

Inga Maria Vang hevði sjálv vónað at gerast millum tær bestu.

- Eg roknaði við at hava ein møguleika at vinna. Og nú eg havi vunnið, er tað ordiliga deiligt.

- Tað er altíð stuttligt at at fáa eina viðurkenning fyri tað, sum ein hevur gjørt, sigur hon.

Sjálv hevur hon sum mál at menna seg enn meiri – og sjálvandi eisini fáa meiri at gera í framtíðini. Hon er eisini greið yvir, at til hetta krevjast bæði umstøður og nógv tíð.

Inga Maria hevur lært til sniðgeva í Italien í trý ár, men arbeiðir í løtuni í einum klædnahandli. Annars fer ein stórur partur av frítíðini til at sniðgeva og aftur sniðgeva.

## Leyst og stramt

Millum pløggini, sum Inga Maria hevur sniðgivið er altso hesin vinnandi kjólin, sum hon sjálv sýndi fram eftir almannakunngerðingina.

Í grundgevingini sigur dómsnevndin, at valið av tilfari til kjólan er bæði spennandi og kreativt.

- Sniðgevin hevur megnað at samansjóða tað feminina og tað ráa. Eitt rák úr farnari tíð og mentan, tá hugsað verður um klæði úr skinni og roð, og sum eisini er eitt nútíðar rák.

- Samstundis sum kjólin er bleytur úr hann eisini strammur, og sýnir í øllum eisini veitslulag og kæti, sum tikið verður til.

Í dómsnevndini sótu Astrid Andreasen, Jórun Dánialsdóttir og Petrina M. Berg

Hetta var samstundis endin á sølyframsýningini í Mullers pakkhúsi og tiltøkini í Norðurlandahúsinum. Og sum skilst hava tey verið sera væl vitjað.

Men í morgin byrjar kortini ein ráðstevna í Norðurlandahúsinum undir heitinum "Snið & handverk sæð í heimligum og altjóða høpi".

## Reyður tráður

So líðandi eru verkini hjá Ingu Mariu vorðin alt meiri og meiri kend her á landi. Men hon vónar kortini, at føroysk sniðgeving kann røkka enn longur út.

- Dreymurin hjá mær, er at vit ein dag fara at kunna framleiða reint føroysk merkir, - at vit kunnu skapa eitt føroyskt mótamerki, sum kann verða selt víða um, sigur hon.

Ein liður í at fáa henda dreymin til veruleiki er ein hugsan at fáa fleiri føroyskar sniðgevarar at arbeiða saman til at skapa ein serføroyskan móta.

- Verða vit fleiri saman, so fáa vit nógvar fyrimunir burtur úr hesum: Tað verður fyri tað fyrsta bíligari.

- Men í øðrum lagi verður tað jú eisini skaptur ein reyður tráður gjøgnum alt tað, sum vit fara at skapa, sigur Inga Maria.

Í morgin skal hon aftur í eldin. Hon er ein av fyrireikarunum á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum, og skal m.a. sjálv vísa fram klæði síni.

# Úrskurður um vinnaraplaggið

- Valið av tilfari er spennandi og kreativt. Sniðgevin hevur megnað at samansjóða tað feminina og tað ráa. Eitt rák úr farnari tíð og mentan, tá hugsað verður um klæði úr skinni og roð, og sum samstundis er eitt nútíðar rák.

- Har eru bleytar linjur við nógvum rørslum – havið, ið ongatíð hvílir, men samstundis er kjólin eisini "strammur" ella "strict", sum sagt verður á enskum.

- Brúnu og reyðbrúnu litirnir eru "álvarsamir", men grøna silkið, ið súðar um leggirnar og dagar undan allastaðni sýnir veitsluhug og kæti.

- Kjólin er tíðarleysur og hóskar bæði eldri og yngri kvinnum.



*Inga Maria Vang tók seg væl út í sínum egna kjóla*